Heðin Mortensen
løgtingsmaður

Nr. 15/2020

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um endurvenjingartilboð, settur landsstýrismanninum í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Er tað rætt, at nýggi H-bygningurin ikki inniheldur heitvatnshyl til ergo- og fysioterapideildina?
2. Um so er, ber tað til at fáa heitvatnshylin inn aftur í verkætlanina?
3. Um ikki, ætlar landsstýrismaðurin at betra umstøðurnar hjá verandi hyli?
4. Um ikki, ætlar landsstýrismaðurin at hækka játtanina til rakstur av verandi heitvatnshyli, so tilboðið er opið allar yrkadagar?
5. Kunnu pínusjúklingar vænta, at betri ella fleiri heitvatnsviðgerðir verða partur av nýggju endurvenjingartilboðunum í sjúkrahúsverkinum, sum eru í umbúna?

Viðmerkingar:
Eitt væl kent tilboð innan endurvenjing og pínulinnan er viðgerð í heitvatnshyli. Landssjúkrahúsið hevur í dag ein eldri heitvatnshyl, sum er lítil, og umstøðurnar rundan um eru ótíðarhóskandi. Tað eru nógv, sum hava tørv á regluligum viðgerðum, men játtan er ikki til at hava hylin í brúk allar dagar í vikuni. Nú nýggjur sjúkrahúsbygningur er á veg, er tað áhugavert at spyrja, um ætlanin er at betra umstøðurnar fyri viðgerð í heitvatnshyli.

Sambært tíðindaskrivi frá Heilsumálaráðnum verða fleiri nýggj endurvenjingartilboð sett á stovn innan sjúkrahúsverkið í heyst. Landsstýrismaðurin boðar frá, at hann arbeiðir fyri at fáa játtan til enn fleiri endurvenjingartilboð í 2021.[1] Fyri at fáa greiðu á, um pínusjúklingar kunnu vænta sær nýggjan heitvatnshyl ella betri/fleiri heitvatnsviðgerðir sum part av nýggju endurvenjingartilboðunum, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 3. september 2020

Heðin Mortensen

[1] https://www.hmr.fo/fo/kunning/tidindi/landsstyrismadurin-setur-ferd-a-endurvenjing/